Landsliðini til NM

Greitt er nú, hvørji pør mynda føroyska landsliðshópin til NM, sum verður í Føroyum í mai komandi ár

BRIDGE
Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen

Í hópinum til liðið í opna raðnum eru fýra pør teknaði til landsliðsvenjingina. Við á tað endaliga landsliðið skulu trý pør, og hesi verða úttikin seinni.

Pørini eru:
Bogi Simonsen — Rói á Rógvu Joensen
Jóannes Mouritsen — Heðin Mouritsen
Símin Lassaberg — Magni Jøkladal
Per Kallsberg — Dánjal Pauli Mohr

Svend Novrup skal standa á odda fyri venjingini, og hann verður eisini liðskipari á liðnum undir NM kappingini.

Greitt sýnist longu nú at vera, hvussu kvinnulandsliðið verður mannað, tí einans trý pør eru teknaði til landsliðsvenjingina.

Pørini eru:
Marjun Restorff — Arnleyg Mikkelsen
Jón Grunnveit — Henriette Svenstrup
Maria Christiansen — Laila Danielsen
Venjari og liðskipari hjá kvinnunum verður Marner Joensen.

Frá eini av kappingunum í 1. deild í ár. Oddaspælari Kaggans, Bjarni Skaalum í essinum.

Gongd komin á billardkappingina

Dystir eru nú leiktir í øllum trimum deildunum, og higartil hevur Kaggin lagt seg á odda í bestu deildini

BILLARD
Tíðindaskriv

Nú er gongd komin á billardkappingina. Dystir eru spældir í øllum trimum deildum. Støaðn í 1. deild er tann, at Kaggin liggur á odda við 12 stigum, Tvøroyrar Billardfelag er nr. 2 við 10 stigum, Havnar Klubbi nr. 3 við 8 sitgum og Billardfelag Fuglafjarðar nr. 4 við 6 stigum. Enn hava Klaksvíkar Klubbi og Vágs Billardfelag ongan dyst spælt. Herfyri vitjaði Havnar Klubbi á Tvøroyri og fór heimaftur við 8 stigum av 18. Ikki óvæntað gjørdist Max Rasmussen besti spælarin við 18.17 eygum í meðal. Hann vann allar dystirnar. Carsten K. Hansen var næstbestur við 16.40 eygum í meðal. Hann vann tveir dystir. Á liðnum hjá Havnar Klubbi spældu eisini feðgarnir Niels og Eirikur Nielsen. Teir fingu ávikavist 15.10 og 14.03 eygu í meðal. Eirikur hevur ikki verið við í liðkapping í nøkur ár. Hóast hetta heldur laka úrslitið í fyrsta dystinum kann roknast við, at hann við síni nógvu rutinu og góða billardeygað fer at draga mong stigini heim, áðrenn kappingin endar í mars. Tað vísir seg eisini, at øll úrslitini í 1. deild eru undir meðal, men sohvørt kappingin gongur, ressast eisini spælararnir, so alt kann henda. Hinir spælararnir á liðnum hjá Tvøroyri eru Óli Joenen og Jens Pauli Poulsen.

Í aðru deild er Billardfelag Kaggans eisini á odda. Tað hevur 12 stig. Nr. 2 er Billardfelagd Fuglafjarðar, sum hevur 6 stig. Fleiri dystir eru ikki spældir. Í dystinum millum Kaggan og Fuglafjørð gjørdist Jóannes Skaarup bestur við góðum 16 eygum í meðal.. Næstur honum var Jákup Gaard úr Fuglafirði.

Í triðju deild hevur Vágs Billardfelag lagt seg á odda við 16 stigum. Tvøroyri hevur 2 stig.

Fleiri dystir verða spældir í billardkappingini komandi vikuskifti.

Støðan, 1. deild

	Dystir	Stig	Eygu	Umfør	Miðal
1 Billardfelag Kaggans	1	12	3.306	180	18,37
2 Tvøroyrar Billardfelag	1	10	2.960	180	16,44
3 Havnar Klubbi	1	8	2.732	180	15,18
4 Billardfelag Fuglafjarðar	1	6	2.808	180	15,6
5 Klaksvíkar Klubbi	0	0	0	0	0
6 Vágs Billardfelag	0	0	0	0	0

Støðan, 2. deild

	Dystir	Stig	Eygu	Umfør	Miðal
1 Billardfelag Kaggans	1	12	2.170	180	12,06
2 Billardfelag Fuglafjarðar	1	6	1.776	180	9,87
3 Vágs Billardfelag 1	0	0	0	0	0
4 Vágs Billardfelag 2	0	0	0	0	0
5 Havnar Klubbi	0	0	0	0	0
6 Tvøroyri	0	0	0	0	0

Støðan, 3. deild

	Dystir	Stig	Eygu	Umfør	Miðal
1 Vágs Billardfelag	1	12	1.160	180	6,44
2 Tvøroyrar Billardfelag	1	2	776	180	4,31
3 Klaksvíkar Klubbi	0	0	0	0	0
4 Billardfelag Kaggans	0	0	0	0	0
5 Havnar Klubbi	0	0	0	0	0

Nýggj fótbóltsnevnd í Klaksvík

Fótbóltsnevndin hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag, KÍ, hevði aðalfund í farnu viku. Fyri vali stóðu Karl Birgir Isaksen, Manni Høgnesen og Odd Færø. Teir báðir fyrst nevndu vórðu báðir valdir aftur. Odd helt seg ikki til at stilla upp til enn eitt skeið í nevndini, og í hansara stað varð Markus Tummas Jacobsen valdur.

Í nevndini, har Karl Birgir Isaksen framvegis er formaður, sita umframt Manna og Markus Tummas eisin Jórun Jacobsen og Hans Jacob Heinesen.

-jm

B68 tiltak á Svangaskarði

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið verður árligi B68 basarurin á Svangaskarði. Talan er um eydnuhjól og tombola. Í kvøld verður byrjað klokkan 20, og í annað kvøld verður lagt fyri kl. 19.

Tiltakið, sum altíð er í november, plagar at fáa sera góða undirtøku, og inntøkurnar plaga at vera so mikið frægar, at tær eru eitt gott íkast til raksturin av ítróttarfelagnum á Toftum.

-jh

UTTAN ÚR HEIMI

Rakettir eftir ísraelskum ferðamannaflogfari

Rakettirnar raktu ikki, men ein sjálvmorðsbumbabumba drap ellivu fólk á einum ísraelskum hotelli í Mombasa í Kenya, teirra millum tey trý sjálvmorðsbumbufólkini

YVIRGANGUR
Árni Joensen

Afrikanska landið Kenya kom aftur á heimskortið hjá altjóða yvirgangi gjáramorgunin. Fyrst frættist, at ein bumba var bostin á einum hotelli í býnum Mombasa, og løtu seinni frættist, at eitt ísraelskt ferðamannaflogfar var sloppið undan tveimum rakettum, sum onkur hevði skotið eftir tí, júst sum tað fór á flog úr floghavnini í Mombasa.

Álopið á hotellið var uttan iva væl lagt til rættis. Beint undan bumbubrestinum vóru 140 ísraelsk ferðafólk komin á hotellið, og tey vóru í ferð við at skriva seg inn, tá ein bilur brádliga koyrdi inn ímóti hotellinum. Stutt eftir brast bumban, og sambært kenyansku myndugleikunum doyðu ellivu fólk. Trý teirra vóru sjálvmorðsbumbumenn, sum høvdu sprongt bumbuna. Hini vóru tvey ísraelsk børn og seks kenyanar.

Illgruni um al-Qaeda

Ísraelsku ferðafólkini vóru komin til Mombasa við einum leiguflogfari hjá ísraelska flogfelagnum Arkia. Flogfarið skuldi júst fara aftur til Ísraels við 261 ferðafólkum, tá onkur skeyt tvær rakettir eftir tí. Rakettirnar raktu kortini ikki.

Ísraelska flogfelagið El Al kunngjørdi stutt eftir tilburðin, at tað hevði gjørt av at avlýsa allar sínar rutur úr útlondum til Ísraels.

Ísraelskir diplomatar søgdu í gjár við tíðindastovuna Reuters, at tað var uttan iva al-Qaeda, sum skipaði fyri álopunum í Kenya. Tá amerikansku sendistovurnar í Kenya og Tanzania vórðu sprongdar í luftina í 1998, vildu amerikanarar eisini vera við, at al-Qaeda hevði lagt bumburnar har.

Irak verður lagt lamið longu ta fyrstu náttina

Kanningarúrslitið hjá STvápnaeftirlitsmonnunum verður avgerandi fyri, um USA fer at gera álvara av ætlanini at leypa á Irak. Um so verður, eru amerikanararnir væl fyrireikaðir
Mynd: Reuters

Amerikanararnir hava longu lagt álopsætlanina ímóti Irak klára. Longu ta fyrstu náttina verður landið lagt fullkomiliga lamið

IRAK-KREPPAN
Árni Joensen

Eftir ætlanini, sum serfrøðingarnir í verjumálaráðnum Pentagon hava lagt, skulu amerikanararnir oyðileggja radarstøðir, samskiftisstøðir og myrkaleggja alt Irak longu ta fyrstu náttina, gevur George W. Bush, forseti boð um álop.

Tað fyrsta, sum Saddam Hussein og hansara menn fara at varnast, verður, at alt radarkervið, sum skal halda eyga við fremmandum flogførum, er oyðilagt. Tí fara serliga beinraknar amerikanskar rakettir og laserstýrdar bumbur syrgja fyri longu ta fyrstu náttina.

Samstundis fara onnur flogfør at tveita eitt tons tungar fylgisveinastýrdar bumbur eftir samskiftisstøðum um alt Irak. Tað fer at hava við sær, at teir hernaðarligu leiðararnir í Bagdad kunnu ikki tosa við yvirmenninar á teimum ymsu herstøðunum kring landið. Tað seinasta stigið í tí fyrsta álopinum verður so at sløkkja ljósið á øllum herstøðunum.

Sambært blaðnum Wall Street Journal vænta serfrøðingarnir í Pentagon, at tær fyrstu amerikansku herdeildirnar kunnu sendast inn í sjálvt Irak minni enn fjúrtan dagar aftan á tey fyrstu rakett- og bumbuálopini. Lagt verður afturat, at hesaferð verða deildirnar ikki so stórar sum undir Flógvakrígnum, og tað ger, at tær fara at kunna taka seg munandi skjótari fram.

Undir Flógvakrígnum í 1991 bumbaðu amerikananarnir Irak í 40 dagar, áðrenn hermenninir vórðu sendir inn í landið. Tá vóru bara 10 prosent av bumbunum laser- ella fylgisveinastýrdar, men í einum møguligum komandi álopi á Irak nú verða umleið 80 prosent av rakettunum og bumbunum stýrdar við laserskipanum ella fylgisveinum.

Tey eldru niður í løn

Fyrrverandi blaðstjórin á norska blaðnum Dine Penger heldur, at arbeiðstakarar, sum nærkast pensjónsaldrinum, eiga at fara niður í løn.

Christian Vennerød sigur, at eitt tílíkt stig hevði gjørt tað hugaligari hjá fyritøkunum at hildið teimum eldru á arbeiðsplássinum, og tað hevði samstundis gjørt, at arbeiðsgevarar ikki longur høvdu kunnað kært seg um, at tey eldru kosta ov nógv.

Christian Vennerød heldur, at tað er ikki órímiligt at skerja lønina hjá teimum eldru á arbeiðsmarknaðinum. Hann sigur, at eldri fólk eru, minni orka tey, og tí kemur eisini minni av skafti hjá teimum, sigur hann. Fleiri teirra eru eisini plágað av sjúku og sliti

Stjala 50.000 teldur um árið

Danska KT-felagið Gigasoft heldur, at í ár verða umleið 50.000 teldur stolnar frá fyritøkum og einstaklingum í Danmark.

Gigasoft sigur, at hvørki tryggingarfeløgini ella løgreglan skráseta tær stolnu teldurnar sum ein serligan bólk, og tí er torført at finna nøkur álítandi tøl har. Hinvegin heldur felagið, at teldustuldur kostar dansku tryggingarfeløgunum einar 300 milliónir krónur um árið. Oman á tað kemur, at á nógvum arbeiðsplássum hvørva teldur, uttan at tað ber til at siga, at nakar hevur brotið inn eftir teimum. Gigasoft metir, at hetta slagið av stuldri svarar til einar 180 milliónir um árið.

Loksins eru tað teldurnar, sum innbrotstjóvar stjala úr vanligum donskum heimum. Hesin stuldurin er mettur til 20 milliónir um árið. Tað vil við øðrum orðum siga, at danir stjala - ella missa - teldur fyri eina hálva milliard krónur árliga.

Oyðandi krabbi

Ein limur í norska Stórtinginum krevur nú, at myndugleikarnir taka stig til tess at steðga kongakrabbanum, sum herjar havbotnin millum Finnmørkina og Bjarnoynna.

Kanningar hjá fiskifrøðingum hava víst, at kongakrabbin hevur breitt seg nógv á hesum leiðunum í seinastuni. Trupulleikin við hesum krabbaslagnum er, at hann etur alt livandi á botni, og nógvastaðni líkist botnurin tí mest einari undirsjóvaroyðimørk, verður sagt. Herfyri funnu fiskifrøðingar kongakrabba 100 fjórðingar í útnyrðing úr Nordkapp, og so langt úr landi hava teir ikki sæð kongakrabba fyrr.

Jan Sundet, fiskifrøðingur sigur hetta vera eitt tekin um, at kongakrabbin er á veg ímóti Bjarnoynni og Svalbard. Tað hevur fingið Synnøve Konglevoll, stórtingslim at taka málið upp í Stórtinginum, har hon krevur, at myndugleikarnir taka onkur stig til tess at forða tí oyðandi krabbanum í at breiða seg.

Dystur um dyst

Norðmenn, sum hava áhuga fyri fótbólti, bíða í spenningi eftir EM-landsdystinum millum Noreg og Danmark í Keypmannahavn næsta ár. Fyrri dysturin, sum var í Oslo, endaði við javnleiki.

Men nógvir norðmenn eru vónbrotnir, nú tað er komið fram, at norska fótbóltssambandið fær bara 2.000 atgongumerkir at selja til dystin. Ein talsmaður hjá fótbóltssambandinum sigur, at teir kundu léttliga fylt ítróttarparkina í Keypmannahavn við 41.000 norðmonnum.

Tað vferða heldur ikki 2.000 vanligir norskir áskoðarar, sum sleppa til Keypmannahavn at hyggja at dystinum, sum í Noregi verður mettur sum stórdystur. Fótbóltssambandið sigur, at meginparturin av atgongumerkjunum er til stuðlar, felagsskapir og onnur útvald.